LM-082/2023

Føroya Kærustovnur

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøtersgøta 7
100 Tórshavn

mariam@bumr.fo

Tórshavn, 17.01.2024
J.Nr.: 24/01484 (at tilskila í svari)
Viðgjørt: UH/AH

Ummæli - uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd (barnaverndarlógin)

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur sent *uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd* (barnaverndarlógin) til Føroya Kærustovn til ummælis

Føroya Kærustovnur hevur ikki viðmerkingar til §§ 1, nr. 1., 2., 6.og 7.

Til nr. 1, nr. 3

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at tað ikki framgongur greitt av viðmerkingunum til ætlaðu broytingina, hvørt fyriskipanin kann setast í verk, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta seg ímóti avgerðini.

Tað framgongur av orðaljóðinum av ætlaðu broytingini, at fyriskipanin (§ 15, stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9, 10 og 12) kann setast í verk um neyðugt, hóast foreldramyndugleikin ikki loyvir tí.

Hóast hetta stendur m.a. soleiðis í viðmerkingunum til ætlaðu broytingina:

> "*Treytin fyri, at fyriskipanin eydnast er, at barnið sjálvt er sinnað at fara í viðgerð, hóast foreldramyndugleikin ikki gevur samtykki til tess. Um tann ungi er 15 ár, skal samtykki fáast til vegar frá honum, áðrenn fyriskipan verður sett í verk, og um barnið er undir 15 ár, skal tað takast við upp á ráð, í tann mun tað er gjørligt.*
> *Barnaverndarnevndin hevur tó ikki heimild til at noyða eina avgerð ígjøgnum, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, framvegis seta seg upp ímóti avgerðini; tað vil siga taka barnið við tvingsli úr heiminum og senda tað til viðgerð ella annað.*"

Til nr. 1, nr. 4

Ætlaða ásetingin í § 19, stk. 5 er soljóðandi

> "'*Barnaverndarnevndin kann, við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Fyriskipanirnar skula viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum hava verið orsøk til at barnið varð sett heiman, og hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møgu-*

Føroya Kærustovnur

liga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman." (okkara undirstriking)

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at Føroya Kærustovnur í sambandi við ásetan av samveru, sambært § 22 í barnaverndarlógini, hevur heimild eftir § 22, stk. 4, nr. 2 til at áseta, at samveran millum barn og foreldur skal/kann verða við luttøku av hjásita (umboð fyri barnaverndartænastuna), sum virkar sum stuðul hjá foreldrunum. Um tað í nýggju ásetingini verður sipað til hjálp/stuðul undir samveruni, metir Føroya Kærustovnur, at tað ikki er skilagott, at heimild verður givin serstakt fyri hesum í § 19, stk. 5 til barnaverndarlógini, tí Føroya Kærustovnur – eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini – longu hevur heimild til tess.

Um tað í nýggju ásetingini einans verður sipað til stuðul til foreldrini áðrenn ella aftan á samveruna er møguligt, at heimildin ikki verður hjá tveimum myndugleikum samstundis (barnaverndarnevndini og Føroya Kærustovni). Tað er tó ikki óvanligt, at hjásitin/stuðulin, sambært § 22, stk. 4, nr. 2 í barnaverndarlógini, hevur samband við foreldrini áðrenn og/ella aftan á samveruna. Føroya Kærustovnur metir tí, at tað er ivasamt, um orðingin at "hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum [...] í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman." heimilar øðrum ella meira enn galdandi rættarstøða.

Til nr. 1, nr. 5

Ætlaða ásetingin í § 21, stk. 3 er soljóðandi:

> *"Tá tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini, kann barnaverndarnevndin, grundað á eina leypandi uppfylgjan og eftirlit við barninum sambært § 16, taka avgerð um at broyta uppihaldsstað, viðgerð og útbúgving v.m., ímeðan barnið er sett heiman."* (okkara undirstriking)

Tað framgongur av ætlaðu ásetingini, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um at "*broyta uppihaldsstað*". Hetta verður ikki nágreinað nærri í viðmerkingunum til ásetingina.

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at Føroya Kærustovnur í sambandi við eina avgerð um umsorganaryvirtøku, somuleiðis tekur avgerð um, hvørt barnið – meðan tað er umsorganaryvirtikið – hevur uppihald í fosturheimi ella verður innskrivað á stovn. Um barnið fær uppihald í fosturheimi, er tað Fosturforeldraskipanin, ið hevur ábyrgdina av hesum. Føroya Kærustovnur tekur ikki avgerð um, í hvørjum góðkendum fosturheimi barnið í ítøkiligu málinum skal hava uppihald í. Avgerðin um ítøkiliga fosturheimið verður tikin av Fosturforeldraskipanina.

Føroya Kærustovnur metir, at tað er ógreitt, hvat liggur í ætlaðu orðingini, og at tað eigur at verða nágreinað, at avgerðin um at "*broyta uppihaldsstað*", ikki snýr seg um at broyta staðið, har barnið hevur bústað, tvs. staðið sum Føroya Kærustovnur hevur avgjørt, at barnið skal hava uppihald í.

Føroya Kærustovnur

Føroya Kærustovnur viðmerkir harumframt, at tað er ivamál um innihaldið og avleiðingarnar av ætlaðu broytingunum.

Sambært § 65 í barnaverndarlógini kann foreldramyndugleikin og barn, ið er fylt 15 ár, kæra avgerðir hjá myndugleikum, ið ikki eru fevndar av § 64 í barnaverndarlógini. Hetta merkir, at foreldramyndugleikin og barn yvir 15 ár, m.a. kann kæra tær avgerðir til Føroya Kærustovn, ið áður kundu verið kærdar til Kærunevndina í Familju-, Almanna- og Heilsumálum. Avgerðir, ið Føroya Kærustovnur (áður Høvuðsbarnaverndarnevndin) tekur eftir tilmæli frá barnaverndarnevndunum, kunnu hinvegin leggjast fyri Føroya Rætt. Føroya Kærustovnur hevur ikki málsræði at viðgera kærur yvir avgerðir, ið eru at meta sum faktisk fyrisiting.

Tað er tí sera týdningarmikið, at tað verður tilskilað heilt greitt, hvørjar avgerðir Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir verða "*fyrisitingarligar avgerðir*", og hvørjar Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir verða "*faktiska fyrisiting*".

Sambært viðmerkinginum til ásetingina tykist greitt, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir, at avgerðir um 1) koppseting, 2) týðandi og avgerandi læknaviðgerð og læknainntriv og 3) spurningar um dóp og konfirmatión eru at meta um fyrisitingarligar avgerðir.

Sambært viðmerkingunum til ásetingina tykist somuleiðis greitt, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir, at avgerðir um 4) val av kommunulækna, skúla, innkeyp av klæðum og líknandi og 5) at fara til lækna og/ella sálarfrøðing við barninum, og t.d. fyriskipaður heilivágur eru at meta sum faktisk fyrisiting.

Í ætlaðu ásetingini stendur at broyta "*útbúgving*" sum dømi upp á fyrisitingarliga avgerð, og hetta er somuleiðis nevnt í viðmerkingunum til ásetingina, sum dømi upp á avgerð sambært § 21, stk. 3 ("*at skifta skúlatilboð*"). Hetta tykist tó at verða í stríð við omanfyrinevndu viðmerking "*val av kommunulækna, skúla, innkeyp av klæðum og líknandi*", ið eru dømi upp á faktiska fyrisiting.

Somuleiðis stendur í viðmerkingunum "*læknalig kanning og/ella viðgerð av barninum, harundir innlegging á sjúkrahúsið – bæði á somatisku og psykiatrisku deild*", sum eitt dømi um avgerð eftir § 21, stk. 3., samstundis sum "*at fara til lækna og/ella sálarfrøðing við barninum, og t.d. fyriskipaður heilivágur*" er at meta sum faktisk fyrisiting. Viðmerkingarnar elva til iva um, hvar markið millum eina fyrisitingarliga avgerð og faktiska fyrisiting er, tá tað snýr seg um læknaviðgerð.

Vinarliga

Anja Hovgaard
stjóri